# Elttør roknar við BP borar í ár

Her eru tvær gerinar á sama dokumenti - til tí fyrru mynd av bori og eltør (hann er í arkivi) og til tí seinnu mynd av skuipoum sum taka olju

OLJULEITING
*Jan Müller*

-Vit hava eingi boð fingið frá BP um, at teir ikki fara at bora. Tvørturímóti legði stjórin hjá BP stóran dent á, at teir kundu byrja at bora í ár, tá skrivstovan varð latin upp í fjør. Tí rokna vit sjálvandi við, at BP borar í ár.

Hetta sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, nú tíðindi hava gingið um, at BP møguliga fór at útseta sína boring til í næsta ár. Tað var føroyski stjórin hjá BP, Hjarnar Djurhuus, sum í samrøðu við Sosialin herfyri segði, at boripallurin Jack Bates, sum skuldi brúkast til Føroyaøkið, helst fór at taka sær av øðrum uppgávum hinumegin markið.

Sosialurin skilur, at BP hevur havt fyrispurning um boriskipið West Navion. Og at tað verður leitað eftir einum boripalli eisini.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður roknar við, at BP fer at bora í ár.*



*BP hevur fyrr boðað frá, at tað fór møguliga at bora tveir brunnar í ár.*

# Hetlendingar ovurstóran áhuga fyri Føroyum

SAMVINNA
*Jan Müller*

Nógv bendir á, at samvinnan millum Føroyar og Hetland bara fer at vaksa. Hetlendingar gjørdu í gjár endaliga av at seta 50 mill. kr. í nýggju Norrønu og sama dag samtykti bretska stjórnin at lata part av fíggingini til út- og umbygg-ingingi av havnaterminalinum í Lervick. –Hetta er spennandi tíðir fyri okkum í Hetlandi, nú skjøtil verður sett á at um- og útbyggja havnina sigur eitt umboð fyri Shetland Islands Council, sum Sosialurin tosaði við í gjár. Umboðið helt tað vera stórhending fyri Hetland, at ikki færri enn tríggjar nýggjar ferjur fara at sigla millum Hetland og Skotland og Føroyar frá 2003. –Tað ganga vanliga meira enn 25 ár at vit fáa eina nýggja ferju. Nú fáa vit tríggjar í sama ári leggur hann aftrat.

Tað er greitt, at hetlendingar síggja stórar møguleikar í eini øktari samvinnu við Føroyar og nú um dagarnar var aðalstjórin í Shetland Islands Council í Føroyum, har hann hevði fundir við umboð fyri vinnulív og myndugleikar m.a. løgmann og oljumálaráðharran.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður sigur, at teir hava fingið eina innbjóðing at koma til Hetlands at síggja umstøðurnar har, eitt nú risastóra oljuterminalin í Sullom Voe.

Eyðun Elttør vitjaði annars í Orknoyggjum nakað herfyri, har hann m.a. sá stóra oljuterminalin har, Flotta. Tað eru hesir báðir terminalarnir , sum í dag taka ímóti oljuni frá Atlantsmótinum, tvs. teimum báðum keldunum Foinaven og Schiehallion skamt frá føroyska markinum. Tað er eingin loyna, at eitt nú hetlendingar fegnir síggja, at møgulig føroysk olja verður flutt til teirra oljuhavn, um so er at føroyingar gera av, at eingin olja skal í land í Føroyum.

Sum Sosialurin skilur, so er møguleiki fyri, at umboð fyri løgtingið t.d. løgtingsins vinnunevnd fara at vitja í Hetlandi í næstum.



*Sullom Voe, oljuterminalurin í Hetlandi, sum nú verður útbygdur. Hetlendingar síggja fegnir, at føroyingar fara at brúka hann*